## Vágur nýggja heimasíðu

Vágs kommuna hevur fingið nýggja heimasíðu, sum tey ætla skal stytta fjarstøðuna millum kommununa og borgaran. - Nýggja heimasíðan fer at verða ein av okkara størstu miðlum til at kunna borgaran um, hvat hendir á býráðsborðinum. Umframt at tíðindastubbar um eitthvørt, sum gongur fyri seg í kommununi eisini fara at liggja á forsíðuni, sigur Vágs kommuna í tíðndaskrivi. Tað er blivið alsamt meira vanligt, at tú kann avgreiða síni ørindi yvir alnetið, og tí er eisini ein sjálvavgreiðsla gjørd til eitt nú umsóknarbløð, umframt tað, at nógv annað tilfarð er gjørt teldutøkt fyri tey, sum vitja heimasíðuna.
Nýggja heimasíðan er at finna á www.vagur.fo



## Lesarabræv bleiv til fyrispurning

Eitt lesarabræv hjá Páll Ismarson Joensen í Sosialinum mánadagin er nú endað sum tingmál. Tórbjørn Jacobsen vil hav Jógvan á Lakjuni at greiða tinginum frá, hví hann í lesarabrævinum verður lagdur undir tilvitað at krógva skjøl fyri løgtinginum í einum ávísum máli. Hann verður eisini lagdur undir at hava lokkað Páll I. Joensen á loynifund á privtaum øki, har eingir embætismenn vóru hjástaddir, har loyniligu skjølini vórðu lisin upp fyri honum. Løgtingsmaðurin hjá Tjóðveldinum vil eisini hava at vita, hvat tað meinast við, tá sagt verður, at "landsstýrismaðurin skipar fyri myrkaspæli og loynifundum av slagnum non existing meeting, sum Páll I. Joensen sigur seg hava upplivað.

# Ein roynd afturat at sparka lív í Suðuroy

**Nú verður ein roynd gjørd afturat at seta gongd á eina menningarætlan fyri Suðuroy**

VAKSTRARAVTALA
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*



*Tað var ein góður fundur, sum tær sjey kommunurnar høvdu við løgmann og nú er ætlanin at kanna møguleikarnar fyri at nakað ítøkiligt skal spyrjast burtur úr. Frá vinstru eru tað Jógvan Mørkøre, samfelagsfrøðingur, Eli Frederiksen, borgarstjóri í Porkeri, Delmar Tausen, borgarstjóri í Hovi, Niclas Hentze, borgartstjóri í Sumba, sum heilsar upp á løgmann, Kirstin Strøm Bech borgarstjóri í Vági og Levi Niclasen, borgarstjóri í Hvalba*

Nú verður ein roynd gjørd afturat at gera eina menningarætlan fyri Suðuroynna.

Hetta er ein ætlan, sum hevur til endamáls at sparka veruligt lív aftur í Suðuroynna.

Í hesum sambandi vóru umboð fyri kommunurnar í Suðuroy í Tinganesi á fundi við løgmann og umboð fyri Innlendismálaráðið mánamorgunin at tosa um eina menningarætlan fyri Suðuroy.

Tað eru nú meiri enn tvey ár síðani, at spurningurin varð reistur um at gera eina menningarætlan fyri Suðuroy.

Hetta arbeiðið skuldi skipast sum ein beinleiðis vakstraravtala fyri Suðuroynni, har allir partar, eisini landið og kommunurnar, beinleiðis bundu seg til at seta nøkur tiltøk í verk.

Ætlanin var, at Magni Laksáfoss, búskaparfrøðingur og Jógvan Mørkøre, samfelagsfrøðingur, skuldi gera eina umfatandi kanning fyri at vita, hvørjar vinnugreinar, tað kundi verið høskandi at sett í verk í Suðuroy og so skuldi allir partar binda seg til at stuðla ætlanini.

Fyribils er mett, at tað fer at kosta einar 50 milliónir at seta eina slíka ætlan í verk og tað síðsta, sum hevur ligið í kortunum er, at landið skal játta 40 milliónir tilsamans tey næstu fimm árini og kommunurnar skulu játta 10 milliónir.

Summi hava hildið, at tað er ikki so átrokandi við eini ætlan fyri Suðuroy, tí har er óvmikið av arbeiði.

Hinvegin hava aðrir ført fram, at hóast nóg mikið er av arbeiði, hevur oyggin ein stóran bygnaðarligan trupulleika við tað, at tað eru alt ov fá størv til útbúgvin fólk og tað er hendan trupulleika, sum vakstraravtalan skuldi bøta upp á.

### Ikki komið úr stað

Hóast tað nú eru meiri enn tvey ár síðani, at tankin varð fostraður, er arbeiðið ikki komin nakran veg yvirhøvur enn, tí tað er langt síðani, at steðgur kom í. Sostatt er onki hent í málinum í langa tíð.

Tí verður roynt einaferð enn at fáa gongd aftur á málið og í hesum sambandi var fundur í Tinganesi síðsta mánadag ímillum tær ymsu kommunurnar í Suðuroy og Løgmann umboð fyri Innlendismálaráðið, og har JógvanMørkøre, samfelagsfrøðingur eisini var til staðar.

Á fundinum greiddu allir partar frá málinum. Kommunurnar greiddu frá sínum sjónarmiði og samfelagsfrøðingurin greiddi frá, hvat liggur í eini slíkari vakstraravtalu.

- Á fundinum varð ongin niðurstøða gjørd og vit fingu ongi lyfti heim aftur við okkum. Hinvegin varð semja um, at løgmaður skal nú tosað við landsstýrið og kanna eftir, hvat kann spyrjast burturúr, sigur Eli Frederiksen, borgarstjóri í Porkeri, sum hevur verið talsmaður hjá kommununum í Suðuroy í hesum máli.

Sjálvur er hann sera væl nøgdur við fundin.

- Hetta vísir, at málið er ikki deytt, men at tað verður arbeitt við tí og eg haldi eisini, at tað var gott fyri málið at fáa umboð fyri samgonguna á tal, leggur hann afturat.

Tað eydnaðist ikki at fáa eina viðmerking frá løgmanni áðrenn blaðið fór til prentingar.

# Samgongan skal umrøða vakstrarætlan fyri Suðuroy

**Løgmaður sigur, at samgongan fer nú at viðgera spurningin um at gera eina menningarætlan fyri Suðuroy, men um nakað spyrst burturúr, ber ikki til at siga**

VAKSTRARAVTALA
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Samgongan fer nú at umrøða møguleikan fyri at gera eina vakstraravtalu fyri Suðuroy.

Tað er úrslitið eftir fundin í Tinganesi síðsta mánadag ímillum kommunurnar í Suðuroy, løgmann, Jacob Vestergaard, landsstýrismann í innlendismálum, Óla Breckmann úr A og suðuroyartingmenninar, Johan Dahl úr B og Hendrik Old úr C.

Jóannes Eidesgaard, løgmaður, staðfestir, at skal nakað henda í málinum er fyrsta treytin, at málið kemur til politiska umrøðu í samgonguni og tað kemur tað nú, tí málið er avgjørt áhugavert.

Men um nakað spyrst burturúr, er óvist, tí løgmaður staðfestir, at málið er ikki einfalt.

Fyri tað fyrsta er talan um nógva pening, heldur hann.

Í hesum sambandi kann nevnast, at talan er um at landið skal binda seg til at seta átta milliónir um árið í fimm ár í eina slíka ætlan, ella 40 milliónir tilsamans.

Harafturat staðfestir hann, at tað er arbeiði til allar hendur og skulu nýggjar vinnur setast á stovn, mugu fólk takast úr øðrum vinnum, ella fáast aðrastaðni frá, og heldur ikki tað verður lætt, tí tað er nóg mikið av arbeiði allastaðni.

*Sjálvt um arbeiði er til allar hendur, er semja um, at Suðuroy hevur ein stóran bygnaðarligan trupulleika, tí ongi størv eru til fólk við útbúgving og tí er tað neyðugt við eini vakstraravtalu?*

- Tað vita vit av og tí er avbjóðingin at skapa førleikakrevjandi størv í Suðuroy, sigur løgmaður.

Men í hesum sambandi heldur hann, at skjøtil er longu sett á eina jaliga gongd í Suðuroy, hóast ongin vakstraravtala.

Hann vísir til skúladepilin í Hovi, sum krevur fólk við útbúgving. Hann vísir eisini til ætlanina at byggja ellis- og røktarheim og heim fyri fyri sinnisveik í Vági. Hann vísir eisini á, at Strandferðslan er flutt til Suðuroyar og at enda vísir hann til ætlaða eftirskúlan í Hvalba, sum eisini krevur førleikakrevjandi størv.

- Tað er avgjørt ein góð byrjan og spurningurin er, hvussu skjótt farast kann fram fyri ikki at renna okkum í tann fløskuhálsin, at vit ikki fáa manna tey størvini, vit skapa.

*Merkir tað, at eftirskúlin í Hvalba er á fíggjarlógini?*

- Í skrivandi løtu er fíggjarlógin ikki løgd fram, so tað verður spennandi at síggja. Í øllum førum kann sigast, at ætlaði eftirskúlin hevur stóra politiska vælvild, sigur løgmaður